

## Kent um Atlantsflog

Atlantsflog mann verða besta arbeiðsplássið á jørð. Eg havi havt sjey framúr góð ár hjá Atlantsflogi, og tað er avgjørt við sorgblíndi, at eg nú gevist har. Atlantsflog hevur verið fyri stórum vøkstri hesi seinastu árini, og tað hevur verið ein sera spennandi tíð fyri okkum, sum hava arbeitt í felagnum.

## Kent um føroyskan hondbólt

Fyrst og fremst er tað keðiligt, at avrikini hjá VÍF skulu verða so svingandi. HSF hevur ikki havt fíggjarligu orkuna til at senda landslið til altjóða kappingar, men tað er neyðugt at fara út í heim at spæla hondbólt fyri at menna seg. Eisini um tað hevur við sær onkrar lúsingar á vegnum.

# Føroyar



*- Lívið í Føroyum er intenst, og fólk liva her og nú. Eg trívist væl við tað, sum føroyingar kanska kalla bygdaligt, sigur Kent L. Christensen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í fyrru helvt av 90'unum starvaðist Kent í Týsklandi og Grønlandi, áðrenn hann í 1996 fekk sær arbeiði innan føroysku ferðavinnuna. Í 1998 tók hann við leiðsluni av Hotel Vágum, og hálvtannað ár seinni fór hann í starvið, sum hann hevur røkt síðani – sum sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi.

### Hotellini mangla tað seinasta

Kent L. Christensen heldur, at føroyska ferðavinnan hevur tikið seg nógv fram seinastu árini.

- Seinastu tvey árini er tað hent meira í føroyskari ferðavinnuni enn 20 tey undanfarnu árini. Tað er góður útviklingur innan gistingarhúsini, og tað er eisini neyðugt. Føroysku hotellini hava ikki nóg høgan standard. Tað manglar tað seinasta til veruliga at kunna standa mát við hotellini í øðrum londum, og her mugu vit gera nakað.

- Tað vildi einki meira upplagt verið, enn at lokka útlendskar fyritøkur til Føroya at halda fundir. Um nevndin í einari danskar fyritøku hevur fund í Hvide Sande ella í Føroyum kann verða líkamikið, um vit hugsa um kostnaðin, men vit mugu lokka hesar fyritøkur við góðum umstøðum, og her mangla vit tað seinasta á okkara gistingarhúsum. Vit mugu lyfta støði eina hálva stjørnu afturat, sigur Kent.

- Tað er nogv jaligt hent innan ferðavinnu seinastu árini. Umstøðurnar á hotellunum, útboði á matstovunum og í náttarlívið er munandi betraðar, og nú ræður um at fáa menningina at røkka út um landið, tí vit mugu eisini hava bygdirnar við.

### Stoltur av at umboða Føroyar

Kent Christensen hevði sín uppvøkstur í danska høvuðsstaðnum, men hann stórtrívist í Føroyum.

- Mær hevur altíð dámt at verið í Føroyum. Eg skuldi bara verða í Føroyum í tríggjar mánaðir síðst í 80'unum, men eg eri her enn.

- Tað er stórur munur á at búgva á Fredriksberg og í Vestmanna, men eg trívist sera væl við føroyska mentalitetin. Her koma fólk veruliga hvørjum øðrum við, og tað er ein nærvera í samfelagnum, sum eg ikki havi upplivað í Danmark. Á Fredriksberg kennir tú jú ikki tínar grannar.

- Lívið í Føroyum er intenst, og fólk liva her og nú. Eg trívist væl við tað, sum føroyingar kanska kalla bygdaligt.

Kent Christensen hevur ferðast víða í sambandi við arbeiði hjá sær sum sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi.

- Eg eri stoltur av at umboða Føroyar uttanlands. Um tú ert positivur og trýrt upp á tað, sum tú selir, so kanst tú selja alt – eisini svávulpinnar. Eg trúgvi upp á Føroyar, sigur Kent Christensen.

### Fakta

**Navn:** Kent Christensen
**Aldur:** 43 ár
**Familja:** Giftur við Signu Andreasen úr Vestmanna. Eiga fýra synir.
**Bústaður:** Vestmanna
**Starv:** Sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi
**Útbúgving:** Handils- og skrivstovu útbúgving hjá Frederiksberg kommunu. Merkonom i administration. CBA frá Berkeley University í USA og AVT Institute i København